# Hópdrápið í Gu

## - Málningurin hjá Picasso, Guernica, sýnir fullkomið kaos: Vónleys móðir við sínum deyða barni - tað spanska fólkið vitni til hópdrápið og blóman, sum tekin um vón. Eli Smith hugleiðir um spaniaferð





SPANIAFERÐ

*Eli Smith, listarmaður*

**4. partur**

Nú eg havi verið her í nakrar dagar, gingið túrar í góðveðrinum, verið til handils ella sitið á café, havi eg hugt eitt sindur eftir fólkasløgunum og teimum ymsu typunum. Her sær tú so at siga øll fólkasløg, sum er eitt úrslit av allari tilflytingini upp gjøgnum øldirnar, av iberarum, keltarum, rómverjum, jødum, sigoynarum, vestgotum og maurarum.

Men eg má fleiri ferðir smílkast við - kenni fleiri typir aftur, stuttligt at síggja dupultgangarar hjá ikki so fáum føroyingum: har gongur hann, har situr hon, og hygg har, Birgar Johannesen og Ingi Mohr, og tú Flemming Samuelsen, ja, tú ber alla tíðina kenslu við onkran. Ein bussur steðgaði, og nógv vøkur ung fólk streymaðu úr. So við eitt, bleiv eg so skakkur, tá tann eini drongurin kom úr bussinum - tað var, sum at síggja sonin hjá mær, Líggjas. So tað rennur nógv suðurlendskt blóð í nógvum føroyingum og meir enn hjá íslendingum og norðmonnum. Nógv av tí stavar frá sjóræningatíðini. Far til Skopunar, Skúvoyar, Mikladals, Hvalbiar, ja nógvastaðni finnur tú hettar myrka. Ættin hjá mær úr Nólsoy hevur eisini hettar íborið. Omma mín bleiv, ikki av ongun, kallað fyri "Svarta Sanna".

Var eina nátt á einum fínum hotelli í Santillana, serliga við tí fyri eyga at sleppa at senda og móttaka email, men sum ikki virkaði. Húsið var frá 1200 talinum, sera gott kamar við terassu - og sum tit síggja á myndini, siti eg við eini appelsin og appelsintrøð aftan fyri meg. Undraðist aftur á hvussu fantastiskt skapanarverkið er. Hendan appelsinin er skapt til okkum menniskju at njóta. Eg má bara siga tøkk, mín Harri, og rennur mær í hug ein strofa, sum Steinvør Fonn syngur, "Takk Gud fyri vakurleika, lív og gleði".

So legði eg leiðina móti tí fyrr umtalaða býnum Gernike, sum tók ein tíma at koyra. Fann eitt parkeringspláss mitt inni í býnum. Vildi so fegin síggja henda bý, tí eg kenni málningin Guernica, sum Pisacco málaði fyri ta republikonsku stjórnina í Madrid og sum skuldi prýða ta sponsku pavilliongina á heimsframsýningini í Paris 1937. Málningurin er um borgarastríðið og serliga um eina skakandi hending, sum býurin Gernika var vitni til. Her kemur søgan: Frá 1936 til 1939 var borgarastríð í Spaniu. Eftir at republikanararnir høvdu vunnið valið í 1936, gjørdu høgravendir fasistar, við general Franko á odda, uppreistur. Við stuðuli frá nasi Týsklandi vunnu Frankosa menn borgarakríggið, sum kostaði 350.000 mannalív, og sum vit síggja á myndini, flýggjaðu nógv illa fyrikomin fólk um tað franska markið.

Franko fekk harða mótstøðu frá Baskarunum, so fyri at bróta stríðsviljan hjá teimum, fekk hann hjálp frá tí týska og italienska flogvápninum at bumba baskarabýin Gernike.

Tann 26. apríl 1937 og mánadagur var. Nógv fólk vóru á torginum henda dag. Har vóru nógvir bøndur og húsmøður, sum keyptu og seldu. Tá byrjaðu klokkurnar í Santa Maria kirkjuni at ringja, fyri at ávara fólkið móti fíggjandaligum flogførum, sum vóru á veg móti býnum. Bert fáum náddi at finna sær skjól, áðrenn 43 flúgvimaskinur náðileyst bumbaðu og við maskinbyrsum drupu alt livandi, sum flutti seg á jørðini. Hesi eirindaleysu álop hildu á í tríggjar tímar, og býurin Gernike upplivdi eitt satt helviti. Millum brennandi hús lógu 1600 mennisku eftirá. Hendan hending skakaði allan heimin. Fýra dagar eftir hettar byrjaði Picasso upp á málningin: Guernica, og fimm vikur tók tað honum at mála hendan mótmælismálning, sum var svartur og hvítur.

Hann sýnir fullkomið kaos, vónleys móðir við sínum deyða barni, tað spanska fólkið, vitnir til hópdrápið og blóman, sum tekin um vón. Málningurin var í útlegd í m.a. í New York og kom ikki heim til Spania aftur fyrrenn eftir, at Franko var deyður og demokratiið aftur var sett á stovn. Nú hongur málningurin í Centro de Arte Reina Sofia savninum í Madrid. Var í býnum, gekk og hugsaði, hvussu ræðulig støðan hjá Gernikubúgvum mátti hava verið. Fór inn á eina café har fyri at skoða hesar íbúgvar.

Hugdi at m.a einum skulpturi eftir kenda mynda høggaran Henry Moore. Gekk framvið ráðhúsinum, har tað baskiska flaggið veitraði. Síðani gekk leiðin norðureystur, yvir móti strondini.

Eftir at hava koyrt eina løtu, kom eg framvið trimum smáum hugnaligum fiskarabýum við nógvum litføgrum fiskibátum. Har var nógv fólk at síggja á gøtunum hendan sunnudagin. Framvið Biskajavíkini liggja nakrar av teimum bestu fiskamatstovunum yvirhøvur. Nakrar ferðir koyrdi eg meg fastan í teimum smáu trafikkeraðu gøtunum niðri við havnalagið. Umsíðir kom eg til býin Sopelana, sum liggur í ein landnyrðing úr Bilbau. Har eg fann eitt gott kampingpláss . Tað, sum fekk meg at koma hagar, var, at í Bilbao er ein tann flottasti listaskáli í heiminum, sum eitur Guggenheim listaskálin. Týsdagin fór eg við metrotokinum inn til Bilbao. Tað tók hálvan tíma. Guggenheim listaskálin, sum lat upp fyrstu ferð í 1997, liggur við ánna: Ria de Bilbao og er tann største turistmagnetin í Baskaralandinum. Hann er blivin eitt symbol fyri Bilbao á sama hátt, sum Jørn Utson'sa operahús er fyri Sydney. Hettar er ein serstakur bygningur, ið er evnaður sum eitt millumting millum eina rúmstatión og eitt risastórt blomstur. Hann er gjørdur úr titanium, steini og glasi. Er teknaður av tí amerikanska arkitektinum Frank Gehry og kostaði 650 milliónir at byggja. Yvist onga løtu í, at hettar hevur verð ein góð íløga. Har vóru nakrar framsýningar, millum annað ein við russiskari list, sum eg var so heppin at síggja. Ikki er á hvørjum degi ein sleppur at síggja tey bestu verkini frá søvnum í Sanktapætursborg og Moskva við bæði nútíðar og eldri list, nakrir risastórir propagandamálningar frá Stalin tíðini og frá revolutiónini, vóru við. Eisini var





*Frásøgumaðurin við eini lokalari appelsin*